# Halda fast um oljuavgjaldið

**Landsstýrið heldur fast um sítt oljuavgjald, hóast oljuprísurin er methøgur og hóttir privatu húsarhaldini. Landsstýrið kann ikki stýra marknaðarprísinum, og ráð eru heldur ikki at strika hetta avgjald**

OLJUPRÍSUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Oljuavgjaldið verður ikki lækkað, hóast oljuprísurin er methøgur og leggur trýst privatu húsarhaldini.

Tað staðfesti landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, tá ið hann fríggjadagin legði uppskotið um fíggjarlóg fyri 2006 fram.

– Vit halda ikki, at tað er rætt at lækka oljuavgjaldið, og tað er eisini støðan hjá tí almenna í fleiri øðrum londum. Vit kunnu ikki stýra marknaðarprísinum, sigur Bárður á Steig Nielsen.

– Um vit tóku avgjaldið av nú, og oljuprísurin hækkaði enn meira, hvat skuldu vit so gjørt? So hevði verið neyðugt at latið oljustuðul. Vit kunnu ikki stýra prísinum, og tí taka vit ikki oljuavgjaldið av, sigur hann.

### Brúk fyri pengunum

Oljuavgjaldið er 80 oyru fyri liturin, og landsstýrið roknar við at fáa 65 milliónir krónur netto fyri oljuavgjaldið í 2006.

Landsstýrismaðurin fjalir ikki út yvir, at hetta eru pengar, sum landsstýrið hevur brúk fyri.

– Vit skulu eisini viðurkenna, at vit hava ikki ráð til at avtaka hetta oljuavgjaldið. Landið hevur brúk fyri pengunum, og samstundis er hetta eisini ein partur av okkara orkupolitikki, sigur Bárður á Steig Nielsen.

– Rættast er, at vit hava meira av óbeinleiðis skattum og minni av persónsskatti, og oljuavgjaldið er saman við øðrum avgjøldum óbeinleiðis skattur, sigur hann.

Tí verður tað ikki landið, sum fer at syrgja fyri einari lækking í oljuprísinum til tey privatu. Sama avgjald er ikki á oljuni, sum vinnulívið keypir.




*Tað almenna skal brúka fleiri pengar til íløgur fyri at hava samfelagshjólini koyrandi, meðan vinnan hevur trupulleikar. Bárður á Steig Nie*
*á fíggjarlógini, sum støðan er í løtuni. Hann roknar við, at tað tekur tvey ella trý ár at fáa hallið á fíggjarlógini burtur.*

## Vegskatturin hækkar við eini helvt

**Bileigarar skulu gjalda eina helvt meira í vektavgjaldið næsta ár, og landsstýrið roknar við at fáa 25 milliónum meira inn í vegskatti. Harafturat verður punkgjaldið á sigarettum eisini sett upp**

VEGSKATTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað verður munandi dýrari at hava bil næsta ár. Landsstýrið ætlar at hækka vegskattin við einari helvt fyri at fáa fleir inntøkur til landskassan.

Hækkingin verður ein generellur vøkstur fyri øll sløg av bilum, og miðalvøksturin verður 50 prosent.

Í ár væntar landsstýrið at fáa 51 milliónir krónur inn í vegskatti, men hendan inntøkan skal vaksa við 26 milliónum krónum næsta ár, so at hon verður 77 milliónir krónur

Eisini prísurin á sigarettum fer at hækka.

Í ár hækkaði prísurin við 37,5 prosentum, men landsstýrið heldur, at pláss er fyri einari hækking afturat. Tí er ætlanin, at punktgjaldið á tubbaksvørum skal hækka, so at tað gevur landskassanum 10 milliónir krónur afturat í inntøku.

Hækkingin í punktgjaldinum fer at hava við sær, at prísurin á sigarettum fer at hækka við eini 10 prosentum.

Samanlagt roknar landið við at fáa 200 milliónir krónur inn í punktgjøldum næsta ár, og tað eru júst tær 10 milliónirnar frá tubbaksgjaldinum, sum koma afturat.

# Alment hall í fleiri ár

**Stígurin í føroyska búskapinum heldur fram, og tí klárar landsstýrið ikki at fáa hallið á fíggjarlógini burtur í 2006. Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum roknar við, at tað verður hall í landsbúskapinum í tvey ella trý ár afturat. Fallandi inntøkur í fiskivinnuni og hækkandi oljuprísir hótta búskapin, men landsstýrismaðurin sær glottar fyri framman í alivinnuni og oljuvinnuni**

FÍGGJARLÓGARUPPSKOT
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Landskassin fer at hava hall í fleiri ár afturat. Stígurin í búskapinum heldur fram, og tí er ógjørligt at fáa hallið burtur næstu árini. Landsstýrið vil heldur brúka fleiri pengar til íløgur, so at samfelagshjólini verða hildin í gongd, meðan vinnan hevur trupulleikar.

Tað staðfesti landsstýrismaðurin við fíggjarmálum fríggjadagin, tá ið hann legði uppskotið um fíggjarlóg fyri 2006 fram í spegilsbygninginum á Argjum.

– Inntøkurnar hjá landskassanum minka við 200 milliónum næsta ár samanborið við 2002, og fallandi inntøkur í fiskivinnuni og hækkandi oljuprísir hótta búskapin. Tí verður eisini næsta ár hall á fíggjarlógini, og eg rokni við, at tað fer at taka tvey ella trý ár at fáa hallið burtur, sigur Bárður á Steig Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum.

Landsstýrið roknar við, at hallið í 2006 verður 219 milliónir krónur. Inntøkurnar falla nakað og verða samanlagt 3,421 milliardir krónur. Útreiðslurnar verða mettar til 3,640 milliardir.

### Halda hjólini í gongd við íløgum

Landsstýrið ætlar sær í 2006 at brúka 280 milliónir krónur til íløgur í Føroyum – tað eru 60 milliónir krónur fleiri til innlendis íløgur enn í fjør.

– Virksemisskapandi politikkurin skal halda fram. Umleið 30 prosent av løgunum fra til vega- og samferðslunetið kring landið, og íløgurnar verða spjaddar, so tær eru mest virksemisskapandi, har arbeiðsloysið er størst, sigur Bárður á Steig Nielsen.

Nógv íløgur verða lagdar í Suðuroynni, har búskaparliga støðan er verri enn nógva aðrastaðni í landinum. Landið fer at brúka 90 milliónir krónur til íløgur í Suðuroynni, og tað verður

## FAKTA

Landsstýrið hevur nú lagt uppskotið um fíggjarlóg fyri 2006 fram alment. Roknað verður við hesum tølum næsta ár

Inntøkur tilsamans: 3,421 mia. kr.
Skattainntøkur: 1,393 mia. kr.
Avgjøld og tollur: 1,397 mia. kr.
Blokkstuðul: 631 mió. kr.

Útreiðslur tilsamans: 3,640 mia. kr.
Rakstrarútreiðslur: 3,422 mia. kr.
Íløgur: 185 mió. kr.
Rentur: 33 mió. kr.